## Færri fáa HIV

Síðani sjúkan HIV ella eyðkvæmi bleiv staðfest á fyrsta sinni, hava umleið 60 milliónir fólk fingið smittuna, og av teimum eru umleið 25 milliónir deyð. Tað stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing, sum ST almannakunngjørdi í gjár. Í frágreiðingini stendur eisini, at sjúkan breiðir seg als ikki so nógv nú sum fyrr, og at talið á nýggjum tilburðum er minkað nógv. Nevnt verður, at sambært hagtølunum eru teir nýggju tilburðirnir fækkaðir 17 prosent tey seinastu átta árini. Í fjør vórðu 2,7 milliónir fólk smittað við HIV, og í løtuni hava 33 milliónir fólk smittuna í sær, sigur ST.



## Vil verða forseti

Tað kom óvart á fleiri, tá tann kendi sjónvarpsmaðurin Lou Dobbs gjørdi av at gevast hjá sjónvarpsstøðini CNN, sum hann hevur arbeitt hjá síðani byrtjanina í 1980. Sum vertur í sendingini "Lou Dobbs Tonight" hevur hann havt sera bersøgin sjónarmið um Barack Obama, forseta í seinastuni, og tað var kanska ikki av tilvild. Í einari samrøðu fyrrakvøldið avdúkaði Lou Dobbs, at hann fer at umhugsa at stilla upp á forsetavalinum í 2012. Hann segði, at hann nú at ráðføra seg við sínar hollu ráðgevar, og at teirra ráð fara at gera av, hvørt hann fer at stilla upp ella ikki.

# Útróðrarmenn í Sandoy léttari til marknaðin

**Seinastu árini hevur tað verið trupult at verið útróðrarmaður í Sandoynni. Menn, sum hava róð út við línu og snellu, hava verið noyddir sjálvir at ført fiskin til marknaðin sjálvir, antin inn á Toftir ella vestur í Vágar, har landingarmiðstøðir eru**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At kalla allur útróðrarfiskur verður seldur um uppboðsøluna hjá Fiskamarknaði Føroya, men til tess at fáa fiskin til marknaðin, hevur verið neyðugt hjá útróðrarmonnum í Sandoynni - hvør í sínum lagi - at fáa fiskin til marknaðin.

Hetta hevur í nógvar mátar verið ógvuliga trupult og hevur gjørt arbeiðsdagin hjá útróðrarmonnum nógv meira tíðarkrevjandi.

Virkini hjá Sandoy Seafood arbeiða bara upsa og keypa tískil ikki útróðrarfisk.

### Flutningsloysn

Nú er so ein loysn funnin á hesum trupulleika hjá útróðrarmonnunum í Sandoynni.

Tá Sandoy Seafood keypir upsa úr eitt nú Sørvági, koyrir bilur fiskin til Ternuna á Gomlurætt og haðani í Sandoynna.

Nú hevur Sandoy Seafood bjóðað útróðrarmonnum í oynni at goyma fiskin í teirra kuldarúmum á Sandi og í Skopun, og tá so bilur kemur við fiski, tekur bilurin útróðrarfiskin við sær aftur og fær hann til marknaðin, har hann verður seldur.

Tað var í síðstu viku, at útróðrarmenn í Sandoynni fingu hesa skipan, og í síðstu viku fóru soleiðis 12 tons av útróðrarfiskin av oynni í bili.



*- Vit hava bjóðað útróðrarmonnum fyri eitt so lítið gjald, sum vit yvirhøvur tora, at goyma fiskin í okkara kuldarúmum, til hann fer av oynni, sigur Martin Olsen, virkisleiðari á Sandoy Seafood*

# Ísraelar og indari vitja Oilwind

**Í hesum døgum eru tveir ísraelsmenn – faðir og sonur og ein indari - í Føroyum og vitja Oilwind í Miðvági, har teir serliga hyggja at línureiðskapi, sum føroyski veitarin framleiðir**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Feðgarnir úr Ísrael og indiski hýruvognsførarin saman við Jeffri Johannesen, sølumanni og Jákupi Joensen, stjóra á Oilwind*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

Jeffri Johannesen, sølumaður hjá Oilwind, sigur, at ísraelsmenninir fáast við fiskivinnu og sóu línuskipanina hjá Oilwind á filmi, sum liggur á heimasíðu felagsins.

- Indarin, sum er her saman við teimum, er hýruvognsførari í London, og hann koyrir burtur av jødar, sum búgva í býarpartinum Stanford í London.

Hann sigur, at nú hesir tríggir eru í Føroyum og vitja, hava teir verið á báti og hava soleiðis sæð við egnum eygum, hvussu línuskipanin virkar í verki.

- Í Ísrael fiska teir á gamlan hátt. Teir egna og draga við hond, so nýggja skipanin hjá okkum er í teirra verð rættiliga kollveltandi.

Jeffri sigur, at feðgarnir úr Ísrael fyrstu ferð settu seg í samband við Oilwind, og nú eru teir so her í Føroyum.

- Fyrr í ár seldu vit eina slíka línuskipan til Ísraels, og vit hava selt aðrar skipanir til onnur fjarskotin lond.

Hann sigur, at felagið eisini hevur fingið fleiri fyrispurningar úr fjarskotnum londum, síðan teir løgdu filmin út á netið.

- Teir, sum venda sær til okkara, og soleiðis eisini við ísraelsmonnunum, eru menn, sum hava smærri útróðrarfør, sigur Jeffri Johannesen, sølumaður hjá Oilwind.

# Landarar úr at gera í Sørvági

**Hesa vikuna hava tey havt úr at gera á landingarmiðstøðini í Sørvági. Fleiri skip hava landað, og í morgin verður tørnað til aftur, tá tvey línuskip leggja veiðina upp**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaðu sørvingar partrolararnar, Vesturskin og Vesturvarða, sum høvdu 290.000 pund av upsa. Hetta er ein av bestu túrum hjá skipunum í eitt hálvt ár ella so.

Línuskipið Eystnes landaði eisini í Sørvági mánadagin. Teir høvdu 26.000 pund, sum teir fingu á trimum setum. Eystnes breyt túrin av fyri at fáa hampiligan prís, og sum skilst, vóru teir nøgdir við søluna.

Í morgin landa línuskipini Venus og Vesturhavið í Sørvági, og teir hava umleið 70.000 pund hvør.

Venus byrjaði fiskiskap 14. november og Vesturhavið 17. november, so skipini hava havt millum sjey og tíggju setur í part.

Væl av útróðrarfiski kemur eisini upp á land í Sørvági, og hesa vikuna hava størru útróðrarbátarnir, Líðhamar, Kallanes og Líraberg ligið um 8.000 pund á setuna. Teir seta einar 60 stampar hvørja ferð.

Í Sørvági hevur soleiðis verið nógv landing hesa vikuna, siga tey á landingarmiðstøðini har vesturi.